Fleiri rásir - einki roks

Á DR2 í kvøld kl. 19.50

# Neyðars Dennis



*Bøkjarasonurin Dennis (Michael Palin) fer at royna eydnuna í stórbýnum, har eitt ódjór oyðileggur og drepur*

Hesin filmurin býður uppá krunkasvart skemt. Terry Gilliam hevur leikstjórnað og Michael Palin er í høvuðs-leiklutinum. Hesir báðir vóru partur av manningin á Monty Python, ið borgaðu fyri ørligum skemtisendingum og filmum sum t.d. Life of Brian. Í "Neyðars Dennis" eru vit í tí myrkastu miðøldini, og eitt ræðuligt ódjór drepur og oyðileggur í kongaríkinum hjá honum, ið tey kalla Bruno Kongur Hin Ivingarsami. Uppøstir profetar og grískir vinningskallar royna at gera sær dælt av ræðsluni millum fólk. Mitt í øllum hesum setir Bruno Kongur Hin Ivingarsami sær fyri at halda eina riddarakapping við tí fyri eyga at finna mannin, ið megnar at drepa ódjórið. Hin djarvi vinnandi riddarin fær hálva kongaríkið og alla prinsessuna. Ímeðan er tann góðtrúgvi bøkjarasonurin Dennis á veg inn í stórbýin fyri at gerast ríkur og so vinna sær sína elskaðu Griseldu. Tætt við bróst sítt ber hann sína dýrastu ogn - eitt rotið epli, sum Griselda einaferð átti. Finnur Dennis eydnuna? Og finnur kongurin riddaran, ið megnar at drepa ræðuliga ódjórið?

**Bretskur skemtifilmur frá 1977**
**Upprunaheitið:** Jabberwocky
**Leikstjóri:** Terry Gilliam
- Eftir sama leikstjóra: Brazil, Twelve Monkeys



*Python-brøðurnir, Gilliam og Palin, samstarva í hesum skemtifilminum frá 1977*

# Postboðið ringir altíð tvær reisur

**Amerikanskur krimi/thriller frá 1981**
**Upprunaheiti:** The Postman Always Rings Twice
**Leikstjórn:** Bob Rafelson
**Við: Frank:** Jack Nicholson. Cora: Jessica Lange. **Nick:** John Colicos. **Madge:** Anjelica Huston. Katz: Michael Lerner.

Á Kanal 5 leygarkvøldið kl. 20.00

Frank Chambers (Jack Nicholson) ferðast úr býi til bý. Honum dámar best at vera úti í tí fríu náttúruni. Hann er ikki leingi í hvørjum býi og arbeiðir fyrifallandi fyri at fáa matin á borðið. Ein dagin kemur hann til eina kafeteriu. Her hittir Frank eigaran Nick Papadakis og eisini ta vøkru, eiggiligu konu Nicks, Coru. Tað eydnast Frank at fáa arbeiði hjá Nick, men stutt tíð gongur, so gerast Cora og Frank góð. Cora kennir seg drigna at tí villa Frank, og hvørja ferð tey fáa møguleikan koma tey saman í heitum ástarløtum. Men, hvussu leingi orka tey at goyma teirra ást fyri Nick? Tey bæði seta sær til endans fyri at drepa Nick, tí soleiðis fáa tey tíð til hvønn annan og somuleiðis eina rúgvu av pengum. Og soleiðis gera tey. Parið heldur seg hava framt ta fullkomnu brotsgerðina, men ein sakførari fær varhugan av, at alt ikki ruggar rætt.



*Eitt par, Cora og Frank, rennur undan eini døkkari fortíð og einum illgrunasomum sakførara*



*Heimsgitni sjónleikarin Jack Nicholson, enn einaferð í leiklutinum sum eitt heldur ódámligt menniskja*